## Klassiskur rockur á festival



Rockbólkur Eager To Please fer at spæla á Summar Festivalinum í ár. Bólkurin spælir rocktónleik, sum hann plagdi at ljóða og eigur at ljóða, og íblásturin frá bólkum sum Uriah Heep, Deep Purple og Led Zeppelin er ikki til at fara skeivur í. Bólkurin varð stovnaður í 2005, og fimm tónleikarar spæla við. Eager To Please hevur spælt til Prix Føroyar og Global Battle of the Bands, og fyri kortum gávu teir fløgu út – There's No Pleasin' Some People.

## Økt tunnilsferðsla

Alsamt fleiri bilar koyra gjøgnum teir báðar undirsjóvartunlarnar. Nýggjastu hagtølini hjá tunlunum visa, at fyrstu seks mánaðirnar í ár koyrdu 279.656 bilar gjøgnum Vágatunnilin og 340.447 bilar ígjøgnum Norðoyatunnilin. Hetta er ein vøkstur upp á ávikavist 6,1 og 8,9 prosent.

# Grasið er grønari í Føroyum

**Um tú vilt hava eitt gott starv, so eigur tú at koma til Føroya. Tað vísir ein kanning, sum Stuðulsstovnurin hevur gjørt millum føroyingar, sum hava tikið hægri prógv. Kanningin vísir, at tað er lættari at fáa fæst starv í Føroyum enn burturi. Kanningin vísir eisini, at eingin munur er á lønini í Føroyum og í Danmark**




*Á nýggju heimasíðuni ber til at leita eftir størvum, sum samsvara við førleikarnar hjá teimum, sum vitja síðuna*

STARV
*Tíðindaskriv*

Nýggja heimasíðan www.jobmatch.fo er nú løgd á neti. JobMatch stevnan verður fríggjadagin 26. og leygardagin 27. september á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn. Á JobMatch fara fyritøkur og stovnar at bjóða seg fram, og har kunnu útisetar finna sítt dreymastarv í Føroyum. Harumframt verða viðkomandi framløgur. Fríggjakvøldið verður netverkstiltak í Føroyahúsinum við kjaki um føroyska framtíðarsamfelagið, góðum tónleiki og práti við vinir og kenningar.

JobMatch vendir sær til útisetar og teirra makar, bæði tey sum eru undir lestri, og tey, sum hava lokið útbúgving og arbeiða uttanlands. JobMatch ger tað lættari hjá útisetum at koma í samband við føroyskar fyritøkur og stovnar, og tiltakið er ókeypis.

Torkil Holm Petersen frá Formula International fegnast um tiltakið JobMatch, sum setur luppin á at fáa føroyingar heimaftur til Føroyar.

- Vit fara á Jobmatch millum annað fyri at vísa, at Formula International og Norriq samtakið er ein spennandi altjóða fyritøka í støðugari menning, og at vit ynskja føroyingar í starv, sigur Torkil Holm Petersen.

Tilsamans fara yvir 20 fyritøkur og stovnar at luttaka á JobMatch, og komandi tíðina fer starvstevnan at verða marknaðarførd yvirfyri útisetum.

Føroya Banki er høvuðsstuðul til JobMatch saman við Tórshavnar Kommunu. Tiltakið verður fyriskipað av Bitland í samstarvið við Tórshavnar Kommunu og SamVit.

